# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 1. oktober 2018
Mál nr.: 18/00307-3
Málsviðgjørt: JEK

**Løgtingsmál nr. xx/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum** (Freistin at skráseta motorakfør, sum bara nýta el ella vetni til framdrift, uttan rinda virðisgjald, verður longd til 31. desember 2020)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum**
(Freistin at skráseta motorakfør, sum bara nýta el ella vetni til framdrift, uttan rinda virðisgjald, verður longd til 31. desember 2020)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum, sum broytt við løgtingslóg nr. 12 frá 26. februar 2010, løgtingslóg nr. 160 frá 20. desember 2013, løgtingslóg nr. 57 frá 18 mai 2015 og løgtingslóg nr. 142 frá 18. desember 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 7, stk. 1, nr. 8 verður "áðrenn 1. januar 2020" broytt til: "í seinasta lagi 31. desember 2020".

2. § 7, stk. 1, nr. 8 verður strikað

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, tó so, at § 1, nr. 2 kemur í gildi 1. januar 2021.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

Samgongan hevur sett sær fyri, at fremja átøk, ið skunda undir at gera Føroyar "grønari" og skunda undir framleiðslu og nýtslu av grønari og varandi orku. Í 2030 er málið, at øll elorka á landi skal koma frá varandi orku. Fyri at gagnnýta elorkuna og til tess at fáa fult umhvørvisgagn av umleggingini til varandi orku, verða húsarhald og vinna eggjað til at velja grøna orkunýtslu.

Uppskotið verður lagt fram sum liður í at røkka málinum um, at øll elorka í Føroyum verður grøn í 2019, og at nýtslan av el-orku fylgir við.

Hetta uppskotið er liður í at tryggja, at lagt verður um frá akførum við dálkandi orkunýtslu yvir til grøna el- og vetnisorku, samsvarandi við at framleiðslan av el verður umløgd frá olju og til varandi orku.

Tað eru í dag 66 elbilar skrásettir, 64 persónbilar og 2 vørubilar. Til sammetingar kann nevnast, at eingin elbilur var skrásettur í 2008, tá skipanin varð sett í verk.

Mett verður, at neyðugt er at leingja lóggávuna 2 ár afturat, fyri at fáa veruliga ferð á umskiftið yvir til el- og vetnisakfør.

Við uppskotinum verður tí mælt til, at freistin í galdandi løgtingslóg fyri at skráseta motorakfør, sum bara nýta el ella vetni til framdrift, uttan rinda virðisgjald, verður longd til 31. desember 2020.

Víst verður annars til viðmekingarnar í løgtingsmáli nr. 91/2007, løgtingsmáli nr. 65/2009 og løgtingsmáli nr. 96/2014

Við uppskotinum verður tíðarskeiðið fyri avgjaldsfrítøku eftir løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum tað sama, sum frammanundan er galdandi fyri vektgjald.

**Hoyring**

Lógaruppskotið er lagt til hoyringar á hoyringsportalinum hjá Føroya Landsstýri.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

Uppskotið hevur lítlan fíggjarligan týdning, tí fá av hesum akførum verða innflutt, sum er.

Fer talið hinvegin at vaksa munandi, hevur hetta sjálvandi fíggjarligar avleiðingar til og við 2020, men ringt er at meta um, hvussu gongdin verður. Lógin fer úr gildi 31. desember 2020, so eftir hetta fær lógarbroytingin ikki fíggjarligar avleiðingar.

Uppskotið hevur ikki umsitingarligum avleiðingum fyri landið.

Uppskotið hevur ikki fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna.

Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

Uppskotið hevur jaligar umhvørvisligar avleiðingar.

Uppskotið hevur ikki við sær serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur, og uppskotið hevur ikki við sær marknaðarforðingar.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar sam-felagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1, nr. 1**

Við ásetingini verður freistin fyri at skráseta motorakfør, sum bara nýta el og vetni til framdrift uttan at rinda virðisgjald, longd til 31. desember 2020.

**Til § 1, nr. 2**

Ásetingin um frítøku fyri virðisgjald er tíðaravmarkað og verður sett úr gildi 1. januar 2021.

**Til § 2.**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 1. oktober 2018

**Kristina Háfoss**

landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Fylgiskjal 1: Javntekstur